Summarmóti í gongugøtuni í Havn

Leygardagin skipa›i kunningarstovan í Havn fyri stórari mótas‡ning í gongugøtuni í Havn

Ta› var av allarfagrasta ve›ri, tá i› Kunningarstovan í Havn skipa›i fyri mótas‡ning í gongugøtuni í Havn. Sera nógv fólk var samankomi› til hetta forvitnisliga tiltak. Mi›b‡›urin er farin frá at ver›a ein koyrandi gongugøta til eitt sera vakurt torg. Nógvir handlar høvdu sett sær ein sølubás úti, og hetta var eisini sera væl eydna›.

Summarmótin er alt

Mótas‡ningin var sera fjølbroytt. Ta› var einki ávíst slag av klæ›um sum dominera›i. Ein partur av mótas‡ningini var vi› sera sterkum litum, men sum heild vóru tey flestu klæ›ini ljós.

Vit spurdu ein av fyrireikarunum, hvat summarmótin er?

– Alt! var svari›. Tú gert sjálvur av, hvat er vakurt, tú skalt bara tora og lata teg í, sum tú sjálvur heldur er smart.

Hármótin er ikki so ógvusligur í ár. Í sta›in fyri sterkar litir, so ver›a ta› brúkt meira kontrastir. Ta›, sum sær út til at ver›a t‡dningarmiki› í ár 2000, er at tú skalt tora at bróta frá hinum. So tá tú skalt gera hári› og keypa tær klæ›ir til ólavsøkuna, so er ta› ikki naka› ávíst, tú skalt ganga eftir. Slagor›i› er »Tú skalt tora«

Trummusláttur setti lív í

Tá i› modellini hjá Kallkyn fóru at ganga, var tann pumpandi tecnotónleikurin skifur út vi› vi› sambarútmur. Ta› vóru tveir ungir havnadreingir, Hallur Johannesen og Brandur Jacobsen, sum spældu á hvør sína trummu. Teir bá›ir eru kendir innan fyri føroyska tónleikapallin. Hallur hevur spælt vi› bólkinum Lokum og Tangz, me›an Brandur er trummuspælari hjá Eivør Pállsdóttir í bólkinum Ivory. Vit hava ofta ætla› at roynt hetta, sigur Brandur vi› Sosialin, men ta› er bara blivi› til prát. Men í dag er ve›ri› so gott, at vit hildu, at ta› var upplagt at royna at spæla her ni›ri.

Hondgjørt prýði til føroyska búnan

Støkk inn á gólvið og síggj okkara stóra og góða úrvæl av hondgjørdum prýðislutum úr silvuri til føroyska búnan.



Eisini hava vit skógvaspennir, knappar, stimar og aðrar prýðislutir til føroyska búnan



3arin

SMS · Tel. 353535 · Fax 353536 · E-mail: tryarin@post.olivant.fo

SANSIR TEL 355 355